# Dúgvuberg rendi á land

*Útróðrarbáturin Dúgvuberg úr Klaksvík rendi týskvøldið á Oyndfjarðarfjall og fekk ein leka*

**Klaksvík:** Týskvøldið rendi útróðrarbáturin Dúgvuberg úr Klaksvík á land, tá hann var á veg til Klaksvíkar eftir ein túr.

Teir umborð hava eftir øllum at døma verið óansnir eina løtu, tí báturin stoytti ímóti Oyndfjarðafjalli, og fekk ein leka, sum pumpan umborð ikki kláraði.

Dúgvuberg kláraði sjálvur avaftur og sigldi á Fuglafjørð. Har fekk hann eina størri pumpu hjá Klaksvíkar Sløkkiliði umborð, sum skjóttgangandi báturin, Alpha Pilot, sigldi úr Klaksvík á Fuglafjørð.

Síðani sigldi Dúgvuberg sjálvur til Klaksvíkar, og alla mikunáttina var báturin pumpaður. Tað var so nógvur sjógvur í honum, at hann fekst ikki upp á land á bedingini í Klaksvík.

Mikumorgunin varð Dúgvuberg tikin upp á turt, men hann liggur nú aftur á floti. Skaðin, sum báturin fekk í stevninum, er ikki rættiliga umvældur enn, men lekin er fyribeindur.

Fimm mans vóru við Dúgvuberg, sum hevði eini 40.000 pund í lastini, tá hann rendi á land.

*ek*

# 20 fólk á dreygiskeið

*Í næstu viku fer kendur danskur dreygari at halda dreygiskeið á Tekniska skúla í Klaksvík*

Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Meginpartin av næstu viku fara 20 fólk at luttaka á einum dreygiskeiði á Tekniska skúla í Klaksvík.
Danin, Leif Andersen, sum er ein kendur danskur dreygari, kemur til Klaksvíkar at halda skeiðið, sum byrjar mánadagin og heldur fram til hóskvøldið.

Fleiri føroyingar hava verið í Danmark á skeiði hjá Leif Andersen, sum hevur skrivað fleiri bøkur um dreying. Kaj Christiansen, sum hevur hildið dreygiskeið í Klaksvík, og Jákup Pauli Sundskarð, leiðari á timbur- og snikkaradeildini á Tekniska skúlanum í Klaksvík, fingu hugskotið at fáa Leif Andersen til Føroya.

Tekniski skúlin í Klaksvík er væl útgjørdur við dreygibonkum, og tí verður skeiðið hildið í Klaksvík.

Luttakararnir á skeiðnum eru frá teimum báðum teknisku skúlunum, varda verksstaðnum Virkni í Havn, varda verkstaðnum Brekku í Klaksvík og onkur privatfólk. Luttakararnir gjalda sjálvir fyri skeiðið, og teir fara at búgva á skúlaheiminum, meðan skeiðið er.

# Nógvur roykur frá eini grýtu

**Klaksvík: Sløkkiliðið í Klaksvíkar var fyrrapartin hósdagin boðsent til eini sethús Undir Brúnni.**

**Ein maður lá sjúkur í songini, tá hann gjørdist varugur við, at nógvur roykur var í húsunum. Hann boðsendi tí sløkkiliðnum, sum kom á staðið um hálvgum ellivu tíðina.**

**Eldur var ikki í húsunum, men ein grýta, sum onkur hevði gloymt, var atvoldin til tann nógva roykin. Tá sløkkiliðið kom á staðið hevði maðurin sjálvur fignið grýtuna út um húsini, men tjúkt var av royki inni, og húsini hava tí fingið nakað av roykskaða.**

***ek***



*Norðoya Sparikassi hevði næstan 4 milliónir í avlopið fyrra hálvár í ár. Sparikassin roknar við betri úrsliti seinna hálvár*

# 4 milliónir í avlopi

*Norðoya Sparikassi hevði 3,9 milliónir í avlopi fyrra hálvár í ár, og roknað verður við enn størri avlopi seinna hálvár*

Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Rokskapurin fyri fyrra hálvár í ár vísir, at Norðoya Sparikassi hevði knapt fýra milliónir í avlopi áðrenn skatt.

Hetta er 1,5 millión meira enn sama tíðarskeið í fjør, men seinna halvár í fjør royndist so væl, at sparikassin í norðoyggjum hevði eitt trivaligt yvirskot upp á 18 milliónir krónur.
Norðoya Sparikassi hevði inntøkur fyri 21,9 milliónir fyrra hálvár í ár, og hetta kemst serliga av, at netto rentuinntøkan vaks við 3,2 milliónum. Vøksturin stavar frá einum vøkstri í útlánum seinastu 12 mánaðirnar upp á 70 milliónir krónur. Sparikassin fekk minni í rentum frá lánsbrøvum, men hetta er grundað á eina minking í lánsbrævagoymsluni við 30 milliónum krónum.

Útreiðslurnar til starvsfólk og umsting hækkaði við eini góðari millión upp í 12,5 milliónir, og hetta komst serliga av øktum lønarútreiðslum.

## Gott gjaldføri

Norðoya Sparikassi er sera væl fyri, tá umræður gjaldføri.

Kassapeningur, innistandandi hjá øðrum peningastovnum og lánsbrøv vóru 30. juni í ár samanlagt 215 milliónir krónur. Samlaðu skyldurnar hjá sparikassanum eru 727 milliónir krónur, og er gjaldføri tí næstan ein triðing av hesum. Eftir lógini krevst 73 milliónir krónur, men Norðoya Sparikassa hevur trífalt so gott gjaldføri.

Stuttfreistaðu skyldurnar vóru 241 milliónir krónur, og er gjaldføri 89% av hesum. Í fjør var gjaldføri enn betri, tí tá var tað 115% av stuttfreistaðu skyldunum, men framvegis er tað seks ferðir so nógv sum kravt verður.

Norðoya Sparikassi væntar, at virksemi hjá stovninum verður ein stórt í seinna hálvári í ár, og tí verður eisini roknað við einum avlopi, sum er enn betri enn tað fyri fyrra hálvár í ár.

# Karsten ivast í býráðsvalinum

*Karsten Hansen, landsstýrismaður, ivast í, um hann skal stilla uppaftur á býráðsvalinum í heyst*

Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Karsten Hansen, landsstýrismaður, umhugsar nú, um hann skal stilla uppaftur á býráðsvalinum í heyst.

Síðani 1989 hevur hann sitið í Klaksvíkar býráði, men seinastu tvey og eitt hálvt árini hevur hann røkt starvið sum landsstýrismaður við fíggjarmálum, og tað er hetta, sum nú fær hann at ivast i, um hann skal stilla upp til býráðið.

– Eg havi framvegis stóran áhuga fyri býráðspolitikki í Klaksvík, men eg havi ikki tikið endaligu støðuna til valið í heyst enn. Tað má eg gera sum skjótast, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at hann hevur fingið nógvar áheitanir frá fólki, sum vilja hava hann at stilla uppaftur, og hann hevur hug til tað, men tá býráðsvalið verður, er í hvussu so er eitt ár eftir av hansara tíð sum landsstýrismaður. Tí kann hann í hvussu so er ikki taka sæti í í býráðnum fyrsta árið av nýggja valskeiðnum.

## Flokkurin fer at fundast

Karsten Hansen varð fyrstu ferð valdur í Klaksvíkar býráð í 1989.

Síðani hevur hann sitið fýra valskeið, og hann var fyrstvaldur á Tjóðveldislistanum í Klaksvík seinasta val. Saman við honum varð eisini Steinbjørn Jaocbsen valdur í býráðið. Síðani Karsten gjørdist landsstýrismaður, hevur Hergerð Joensen havt sæti í býráðnum í Klaksvík fyri hann.

Karsten Hansen var varabýráðsformaður í Klaksvík frá 1993 og til hann fór í landsstýrið í 1998. Síðani hevur Steinbjørn Jacobsen verið næsti maður hjá Jógvani við Keldu, býráðsformanni.

– Eg havi bíða sum longst við avgerðini um býráðsvalið, men Tjóðveldisflokkurn skal hava ein fund hendan mánaðin, og til tann fundin verði eg noyddur at taka eina avgerð, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen er útbúgvin løgreglumaður, men hann hevur í nógv ár verið virkin innan politikk.



*Karsten Hansen varð fyrstu ferð valdur í Klaksvíkar býráð í 1989.*




## ACCELERET NLP PRACTITIONER ÚTBÚGVING VERÐUR Í FØROYUM ÁR 2000

Enn eru nøkur fá pláss eftir. Undirvísingin er soleiðis skipað, at tú fært sendandi ein lestrarpakka, ið fevnir um bókina hjá Jack Makani "Skab det liv du ønsker", CD'arar við tíðslinjuferðum, video við framløgu av NLP teknikki og lestrarvegleiðing.
Ætlaninin er so at arbeitt verður við tilfarinum, til útbúgvingin byrjar 5. sept. ár 2000.

**Undir útbúgvingini fer tú at menna og betra evni tíni at:**

- skapa og varðveita gott samband við onnur undir samrøðum og samráðingum
- nýta málsligar vendingar til innsavnan av upplýsingum undir samrøðum og til at vegleiða onnur
- hjálpa tær sjálvum og øðrum í, at seta sær mál, ið verða framd eftir heildarloysnum, ið byggja á grunnleggjandi virðir
- nýta tíðslinjuhættin at loysa upp fyri tíni avmarkaðu sjálvsmynd, og at sameina og røkka mál tíni í framtíðini
- uppliva eina støðu frá trimum ymiskum sjónarhornum, og harvið broyta upplivingina
- broyta innaru myndir tínar og sjálvtos, fyri soleiðis at geva tær sjálvum atgongd til nýggja innaru styrki
- økja hugflog títt, og persónliga smidleika tín
- loysa innaru ósemjur

**Tíðarskeið:** Úbúgvingin byrjar týsdagin 5. september ár 2000 og endar fríggjadagin 15. september ár 2000.

**Lærarar:** Helena Kongsback og Jack Makani frá NLP Huset, Keypmannahavn.

**Kostnaður:** 9.800,- kr. íroknað undirvísingartilfar og ábit/drekka.

**Tilmelding:** Hjá Dianu Borgnýardóttir
tel. 441100 ella 281044
513 Syðrugøta
Teldupost: dkonsult@post.olivant.fo



Original bosal Útstoyt



ES

p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629





Vit gera alt URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78



Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650



bobcat -maskinurnar sum halda!

• Gravmaskinur –*nógv model*
• Lessarar við óteljandi møguleikum!

Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.

*Keyp góðsku – keyp Bob Cat!*



Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



# Jazzfestivalurin

17. Tórshavnar Jazz, Fólka & Blues Festival 2000

Í Norðurlandahúsinum




**Mikudag 9. august**, KR. 80,-

***HALLAS TRAVEL*** ***Bjørn Thoroddsen*** *(IS)*
**JASSARNIR** (FO)
**J.S.& Bach** *Jóhannes Andreassen & Stamen Stantshev (FO)*
**Trio 2/ASSIMILATION** Arne Forchammer (DK)
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**IVORY v/ Eivør Pállsdóttir og John Purcell**

**Hósdag 10. august**, KR. 150,-

***STAVANGER GOSPEL CHOIR*** *(N)*
**A Tribute to Louis Armstrong** *GR/IS/F0/DK trad. Jazz*
**SWINGING LINK v/Jens Nørholm**
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**Kurts Blues Band Åland**



**Fríggjadag 11. august**, KR. 100,-

***LOST PILGRIMS*** *v. Jørgen Dahl*
**JASSARNIR** (FO)
**GREEN GATE** v. Holger Laumann & **PLÚMM**
**PÁLL finnur PÁLL** (FO)
**SQUARE ONE Blues trio (N)**



**Leygardag 12. august**, KR. 150,-

***LIS SØRENSENS GROUP*** *(DK)*
**JASSARNIR** (FO)
**Coco Nelegatti y su QUINTETO**
**ARRABAL arg./tysk Tango ork.**
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**SOFIA FINNILÄ, vokal (**FIN) v. **JAZZOASIS** (FO)




**ATGONGUMERKI TIL ALLAR DAGAR: KR. 360,-**
**Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum, tlf. 317900 og á Kunningarstovuni, tlf. 315788**

Fyrivarni verða tikin fyri broytingum



Lesið sosialin